# Jólakonsertir í Fuglafirði

**Mikil var ljómurin og sangurin til jóla. Børn og vaksin tóku samanum og lættu ljóðið av - av øllum huga og allari sál. Sunnudagin fyri jól lótu Skákstjørnurnar seg í konsertskrúð á himnahválvinum. Hetta var sum ein umbroyting, ið fór fram ovast uppi, sum veitti íblástur til mangt eitt kór- og sanghjartað víða um**

HUGLEIÐING
*Frits Johannesen*

Sunnudagin fyri jól var ein sera góð konsert í kirkjuni í Fuglafirði. Tað var Fuglafjarðar hornorkestur undir leiðslu av Kenneth Mcleod, ið spældi. Her var ikki einans hornorkestur, men eisini ein blásisekstett, ið førdi seg tignarliga fram. Tað sama kann sigast um orgulspælið, solosangin, kvartetsangin og Kingosangin. Hvørt betri enn annað. Sigast kann um hornorkestrini í Føroyum, at hetta eru virknastu bólkar í tónleikinum her á landi. Tey spæla til hátiðarhald, stevnur, fagnaða o.s. fr. hetta gera tey uttan nakran háva, og tómligt hevði tað verið, um hesin táttur í tónleikalívinum varð skerdur.

Mær hóvaði sera væl ljómin í orkestrinum, livandi reint, fraseringarnar lógu tættar, inniligar og ljómurin í hornunum var góður. Vevnaðurin millum bólkarnar í orkestrinum, var ikki sum á berajólið, men sótu væl um sátt og bygdu hvønn annan upp í ljómandi brasstónum. Gott var at síggja tveir Es-bassar og ein B-bass í orkestrinum. Eg vil ikki siga at hetta fjalir fjøld av syndum, men ger at ljóðið, og tónleikurin verður væl betri hagreiddur. Hann verður bygdur á eitt gott grundstøði, og tá verður samanspælið bólkanna millum dyggari. Sigast kann, at onkuntíð hevur orkestrið verið størri, men hvør tann einasti ein, sum sat og spældi, gjørdi sítt til at fatanin av tónleikinum kom upp í ta hædd, har hon eigur sítt sati. Hetta var leiðarinum og orkestrinum til mikla tign og miklan sóma.

Sekstettin ramsaði ikki løgini av sær, men var í síni tilvitan rættstød og streyk avstað í blíðum byri í sonnum jolahýri. Ljóðførini talaðu sína millum hjartaliga, eymliga og musikalskt. Her var eingin, sum stjórnaði. Nei, nú var tað tónamálið, sum kom undan væðingini og kvað sína vísu, sum legði løgini undir fótin. Hetta var hugvekjandi, musiskt og musikalskt.

Kingosangurin var kveikjandi í hesum andans húsi henda dag. Niels og Petur Jacob reinsaðu sínar sálir í hesum gomlu løgum, og runnu tankarnir til Oyndarfjarðar frá barnaárum mínum undir bitunum í Oyndarfjarðar kirkju upp undir jol, tí sungið varð okkurt sum Skúla Jákup og Hans M. Eidesgaard úr Oyndarfirði høvdu sungið inn a band. Meg minnist væl skúla Jákup, sum sang Gamla nóta. Hann var eisini deknur í Oyndarfjarðar kirkju og var sjaldsamt at sita undir lestrinum t. d. jólakvøld, tá ið Elsa í Húsi, Fía við Stein og Dunga Oluffa sótu í sínum stólum við sínum miðaldarliga hugburi, meðan Skúla Jákup las. Her var skaldskapur, og ikki varnaðist tú tá, at Skúla Jákup skuldi røkka til Fuglafjarðar sunnudagin fyri jól ár 2002, við Nielsi og Petur Jacob, sum drógu tráð í eygað við Kingoløgum henda dag. Ja, eg má siga , at væl var frà gingið, góðar vóru versiringarnar, og teimum líkt goymdu teir eftir, næstan sum Skúla Jákup og Hans Marius Eidesgaard høvdu gjørt, og betri kundi tað ikki verið.



*Siloakórið*

*Mynd: Rógvi Rasmussen*



Møguleikarnir við eini konsert eru nógvir. Heðin leikti á urgu. Sigast kann um Fuglafjarðar kirkju, at kirkjurúmið er vælegnað til kórsang og instrumentalan tónleik, og urgan kódnar ikki í hesum trivaliga rúmi, men tey minstu ljóðini røkka upp undir tróðrið og niðuraftur spelkin og kvom. Heðin spældi orgulsolo úr Water Music av G. Fr. Händel. Lætt, ljóst sum lygnir og íðukálvar á ánni Themsen undir Tower Bridge. Tú sást alt hetta fyri tær, sum eina viðkvama impressionistiska mynd. Skvatl, sjóð, aldudrag í orglinum.. otrúligt, men soleiðis er tað bara. Væl spælt.

Jógvan Dahl, Lív, Kenneth og Andrea sungu kvartetsang. Ja sera yndisligt og Andrea sang eina ariu av Giovanni Bononcini. Fer hon at halda á fram við sanginum, fer røddin at mennast og búnast, og kanska fáa vit fleiri slíkar solosangir fra henni í framtíðini. Hon hevur eina dygga rødd, sum eg kenni frá hennara barndómi oig tannáringa tíð.

Konsertin rakk langt, og eingin ódámur var at hoyra nakrastaðni, og takk fái Fuglafjarðar hornorkestur fyri hesa sera hugfarsligu konsert.

Fyri mær stóð sólin still henda dag. I Siloa var eisini ein konsert, ella rættari ein sangløta, sum rann av andaligum sangi og fylgisspæli á klaveri, orgli, floytu og rytmubólki. Hetta gjørdi sangløtuna fjøltáttaða. Ja, dagurin tók ongan enda í hesum tónleikanótakasti. Nógv var at heimta, og nógv gott var lagt afturat tí musikalska førninginum, sum tú bar í tónleikahuga tínum. Sangur og tónleikur ber brá av kveikjandi andum, sum reika kring og lýða okkum í oyruni um sælar dreymar í nótum, tónum, rytmu og ljómi. Hetta hevur eyðkent okkum sum fólk, har sangurin, kórsangurin hevur givið okkum nógvar sælar løtur. Soleiðis eigur tað at vera.

Eyðun og Jógvan á Lakjuni eru eingir ársungar, tá ið tað um sang og tónleik ræður, og hava vit havt óteljandi fródligar sang - og tónleikaløtur saman bæði her á landi og uttanlands, og eru hesar gleðisstundir gott at hava í skjáttuni, meðan fjakkað verður á Guðs grønu jørð.

Kórið í Siloa er eitt gott kór, sum hevur sett dám á bygdarlív okkara við andaligum sangi í eini 15 ár. Sangløtan sunnudagin fyri jól lat ikki neistan frá tí musikalska degnum rúmsast í svøvnloysi í huga tínum, men rakk samljóðið, samskapið og drívmegin í tónum og orðum í ein málbúna av góðum kórsangi. Ótrúligt, so fá vit eru, at vit kunnu í einari bygd hava tvær so fjøltáttaðar konsertir ein dag. Tað sum var felags fyri báðar konsertirnar var, at tær høvdu jólatónleik úr Noregi, Bretlandi og úr okkara egna jørðildi á skránni.

Mær hevur altið dámt sera væl kórsang, tí her eru tað orð, tónleikur og fjøld av fólki, ið medvirka. Chopin brúkti klaverið, at tulka tað, ið hann helt um tónleikin. Kensluliga kunnu vit vera eins hugtikin av klavertónleikinum og kórtónleikinum. Lagt kann verða afturat , um vit við orðum skuldu sagt tað, sum Chopin ætlaði við sínum tónleiki, hevði hetta tikið drúgva tíð. Men øðrvísi er kórsanginum, hann verður settur a búgvið borð: Gerið so væl og fáið tykkum! Orð og lag borið fram av mannarøddum her og nú!

Her er tað samfingin ond millum orð og lag, sum tulka løtuna, og passar lagið væl til orðini, nærkast tú frummegini til allan tónleik. Tú við tíni sál, kroppi, orðum og løgum (tónleikinum) tulkar innasta farið í likami tínum. Nú kann vera, at onkur annar vildi sagt hetta á ein annan hátt, men hetta eru míni orð um henda partin av tónleikinum, og eg meini tað. Tað at skapa úr heimligum jørðildi t. d. Hirðarnir við orðum av Ismar Joensen og lagið av Eyðuni, sum var á skránni, tað kemur at standa sál tíni næst. Hetta er andi Grundtvíks at tøða og taða, har tú sjálvur ert og virkar.

Sangløtan livnaði við orðunum hja Jacob Sande: I hvørjari vrá nú lýsa við týðing av Líggjas av Váli, og var hetta ein góð byrjan. Kórsangur, trio, sangbólkurin Saft og solosangurin dró løtuna av stað í fyllingum í aldudragi av vanligum fólki, sum elska at syngja. Herluf, sáli, segði altíð: Vit syngja, tí okkum dámar at syngja! Tað er eitt gott navnabretti at hava. Hanna úr Leirvik hugtók meg við sínum solosangi. Hon sang við kroppinum, eygunum, varrunum….. og sálini í lagnum: Go, tell it on the Mountain og somuleiðis Elisabeth av Toftum: Jesus, oh what a Wonderful Child. Tey ungu firnast ikki à sini leið í tí tóma rúminum, har vit øll eru stødd. Tey skulu ein dag mynda samfelagið og sangin. Gev teimum góðan byr og vís teimum á ræsur, har gongt er. Tað gevur úrslit; vit fáa eitt gott samfelag .. ja, og góðan kórsang í framtíðini!!

Bólkurin saft sang sera reint og musikalskt. Jógvan við skyldkonunum, Eydnu og Elsebeth sungu inniliga lagið : Kom til mammu - orð/ Marius Johannesen og lagið hevði hann gjørt sjálvur. Teksturin er jólatekstur, so hetta var gott at leggja afturat til jóla. Orð og lag passaðu væl saman.

Hetta var so hesin dagur, har sólin stóð still og Skákstjørnurnar høvdu latið seg í jólaskrúð. Takk fàið Fuglafjarðar horn-orkestur, kórið í Siloa og leiðarum tess fyri ein minniríkan dag! Gott nýggjár øll somul!



# Samansjóða við undirsjóvartunlum

**Í løgmansrøðuni segði Anfinn Kallsberg m.a., at vit eiga at miðja eftir at bora tunlar til Sandoynna og Suðuroynna. Enn er tilfarið í grótinum undir Suðuroyarfirði ikki kannað, men í øllum førum er hol sett á kjakið um fleiri undirsjóvartunlar. Ein varilsig meting sigur tó, at tað hevðI tikið 10 ár at bora ein tunnil úr Sandoynni til Suðuroyar**

TUNLAR
*Theodor E. D. Olsen*

»Um fá ár verður eisini fast samband til Norðoyggjar. Tá hetta er rokkið, má langtíðarmál okkara vera at knýta bæði Sandoynna og Suðuroynna í undir-sjóvarkervið. Tá verða Føroyar knýttar saman í eitt meginøki«. Hesi vóru nøkur av fagurlátnu orðunum, sum løgmaður bar Føroya fólki gamlaárskvøld í sínari nýggjársrøðu, ið varð send í loftmiðlunum. Og hóast røður sum henda helst skulu vera myndaðar við føgrum orðum og djørvum visiónum, so má sigast, at hol er sett á kjakið um undirsjóvartunlar til bæði Sandoynna og Suðuroynna - sjálvandi treytað av norðoyatunnilin fyrst verður veruleiki.

Herfyri var samrøða við Heina Olsen, verkfrøðing, í Degi og viku, har eitt gamalt arbeiði við útrokningum yvir undirsjóvartunlar til allar oyggjarnar í Føroyum var grivið fram aftur.

Hesa ætlan gjørdi Heini Olsen, meðan Mikkjal Helmsdal sat sum landsverkfrøðingur. Í fyrstu syftu ein er hetta ein ætlan, sum kann tykjast eitt sindur science fiction-kend, men sum av fleiri verður tikin alt meira í álvara. Heini Olsen leggur dent á, at sjálvandi er peningur fortreytin fyri slíkum ætlanum, men um jarðfrøðin undir Suðuroyarfirði er til at fáast við, so skuldi einki verið til hindurs fyri at borað ein tunnil til syðstu oynna í Føroyum, Suðuroynna.



*Tað kemur at taka uml. 10 ár at bora ein tunnil til Suðuroyar*

## 10 ár at bora

Teinurin úr Sandoynni til Suðuroyar er einar 25 kilometrar til longdar, og aðrastaðni í heiminum t.d. í Japan og Sveis eru tunlar, sum eru á leið líka langir sum ein møguligur Suðuroyartunnil. Hetta merkir, at hann hevði verið fimm ferðir longri enn tann nýggi Vágatunnilin. Tað tók umleið tvey ár at gera hann, og tí kundi ein bjartskygd meting víst, at vit skuldu falda hetta tíðarskeiðið við fimm og so fingið eina varisliga forsøgn upp á, hvussu langa tíð tíð tað kundi vart at bora til Suðuroyar. Altso eini 10 ár.

Sum nevnt er jarðfrøðin undir Suðuroyarfirði ikki kannað til tunnilsgerð enn, men vit vita, at grótið sunnast í Føroyum er munandi truplari at bora í enn tær sokallaðu miðfláirnar, sum eru í og milum tær norðaru oyggjarnar í Føroyum. Tí hevði tað jarðfrøðiliga í roynd og veru verið meira realistiskt at bora tunlar til tær smærru oyggjarnar, hóast tað neyvan fer at eiga innivist í tí politisku dagsskránni, sum nú eisini snýr seg um tunlar eftir at koyrandi bleiv undir Vestmannasundi, og sum á nýggjárinum altso varð nevnt av sjálvum løgmanni.

## Ikki ráð at lata vera

Ein annar samfelagsviðmerkjari, sum hevur givið sítt íkast til kjakið um tunlar til Sandoynna og Suðuroynna, er samfelagsfrøðingurin Zakarias Wang. Í lesarabrøvum stutt fyri jól nevnir hann fyrimunir og vansar við føstum sambandi í oyggjalandinum Føroyar, og hansara ikki sørt djarva niðurstøða er, at vit skulu spyrja okkum sjálvi, um vit hava ráð at lata vera við at gera hear tunlarnar, tí longdini er strandferðslan alt ov kostnaðarmikil fyri samfelagið. Gera vit hetta, verður koyrandi til Suðuroyar úr Sandoynni um trý ár, metti Zakarias Wang.

Sostatt er hol nú rættiliga sett á orðaskiftið um hol undir Skopunar- og Suðuroyarfirði, og og nýggjárinum setti løgmaðurin úr norðoyggjum sína hugsan um málið.

# Jesus og makedonarin á donskum

**Í maimánaðI verður tónleikaverkið Jesus og makedonarin framført av Sønderjyllands Symfoniorkester í Vejle. Bispurin í Haderslev var so hugtikin av verkinum, at hann avgjørdi at fáa taå til Danmarkar, eftir at hann hevði verið í Føroyum**

TÓNLEIKUR
*Theodor E. D. Olsen*

»Vit hava fingið eina blómandi tónlistamentan, har okkara ungu ganga á odda á eini rás, sum er slóðað fyri í Føroyum. Vit kunnu samstundis gleðast um, at føroyingar eisini eru í fremstu røð, tá tað snýr seg um nútímans tónleik«. Hendan staðfestingin er eins og aðrar í blaðnum í dag tikin úr nýggjársrøðu løgmans. Tað er kortini ikki bara Føroya løgmaður, sum fegnast um føroyska tónlist.



*Pauli í Sandagerði*

Tá skipað varð fyri túsundárahaldinum fyri skjótt trimum árum síðani í sambandi við kristnanina av Føroyum, vitjaðu fleiri norðurlendskir bispar í Føroyum. Millum tey mongu tiltøkini teir vórðu bodnir at luttaka í, var m.o. symfoniorkesturútgávan av Jesus og makedonarin hjá Paula í Sandagerði og Sigmund Poulsen. Ein av gestunum, bispurin í Haderslev, Niels Henrik Arendt, varð so hugtikin av verkinum, at hann avgjørdi at royna at fá Jeus og makedonaran til sítt stift, og hetta eydnaðist honum eftir at Pauli í Sandagerði hevðI hildið ein fyrilestur um sangverkið.

13. mai í ár verður hendan ætlan so veruleiki, tí tá verður hetta føroyska verkið framført á donskum í Musikteatret í Vejle.

Talan er sostatt um eitt professionelt tiltak, tí Sønderjyllands Symfoniorkester hevur fingiðð uppgávuna at framføra sangverkið, og millum sangararnar er føroyski tenorurin Ernst Sondum Dalsgarð, sum syngur orðini hjá Jesusi. Hann var eisini við í symfoniorkesturútgávuni í Føroyum og er í løtuni ein av fremstu sangarum í Danmark.

Pauli í Sandagerði er listaligur samskipari í tiltakinum. Hann greiðir frá, at longu fyri hálvum øðrum ári síðani byrjaði fólk í Vejle at savna pening inn til tess at Jesus og makedonarin kuni setast upp í býnum. Ein slík verkætlan er nevniliga ikki bílig at fara í holt við, og tey megnaðu heldur ikki at savna allan tann neyðuga peningin inn. Vejle Amt kom tó seinni til hjálpar við teimum seinastu írestandi 150.000 krónunum, og tá var farið undir fyrireikingarnar.

Ein lærari, sum undirvísir á sama skúla, har Pauli starvast, hevur týtt orðini hjá Sigmundi Poulsen til danskt saman við Paula og Sigmundi sjálvum. Pauli í Sandagerði er væl nøgdur við umsetingina, og sigur, at tað kennist væl, at Jesus og makedonarin nú aftur skal framførast á palli. Hóast tað ikki ber til at siga, at Jesus ohg makedonarin er eitt kent verk í altjóða tónleikahøpi, so hevur tað kortini víst seg at vera eitt seiglívað verk. Tað varð nevniliga framført fyrstu ferð í 1984 í sambandi við eitt hátíðarhald hjá Tórshavnar Býráði,. Tá var einki symfoniorkestur í Føroyum, og tá ljóðaðI verkið øðrvísi enn í dag, av tí at fleiri rokk- og jazztónleikarar spældu tónleikin. Í dag er alt niðurskrivað og er talan nú um triðju útgávu, sum telur 450 síður av nótum.